# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

1. sepembur fingu Brian K og Turid Mc Intosh Rødekro eina dóttur. Hon vigaði 4170 gr. og var 54 cm long.

1. oktobur fingu Ann Hjelm og Kári Christiansen, Vágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3390 gr.

1. okt. fingu Eyðvør Müller og Jens Heri Jacobsen, Sumba, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4180 gr.

3. oktobur fingu Malan Tyril og Dánial Petur Højgaard, Rituvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4050 gr.

4. oktobur fingu Anja av trøð Trondesen og Jákup Eli Lauritsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4200 gr.

4. oktobur fingu Guðrun og Kári Magnussen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 43 cm. long og vigaði 1770 gr.

5. oktobur fingu Ninna og Tórhallur Justinussen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4635 gr.

5. oktobur fingu Eyðrith Sundsá og René Niclasen, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4180 gr.

6. oktobur fingu Eydna Lucia Abrahamsen og Samson Nesá, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3075 gr.

6. oktobur fingu Alda í Ólavsstovu og Jens Johan Dam, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3890 gr.

6. okt. fingu Birita Poulsen og Kristian Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3450 gr.

7. oktobur fingu Britt Mortensen og Rógvi Winthereig Rasmussen, Malmø ein son sum vigaði 3790 gram og var 55 cm langur

9. oktobur fingu Jutta í Horni Hansen og Ólavur Niels Debes, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3700 gr.

10. oktobur fingu Eyðvør Egholm og Ingdor Klein Olsen, Vestmanna, ein son. Hann var 53,5 cm. langur og vigaði 3550 gr.

10. okt. fingu Joan Zachariassen og Agnar Skorastein, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3450 gr.

## Brúdleyp

Leygardagin 14. oktobur kl. 14.00 giftast í Vilnius Litauen, Saule Kamille Maknyte, ættað úr Vilnius og Thorvald Hjelm, ættaður úr Vági, bæði búsitandi í Keypmannahavn. Brúdleypsadr.: Le Meridien Villon Resort & Cenvention Centre, Highway A2, Vilnius-Riga, 3005 Vilnius-9, Litauen.

Leygardagin 14. oktobur kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni Marjun Johansen og Bjarni Hentze. Veitslan verður fyri innbodnum kl. 19.00 í Róðrarneystinum á Argjum.

Leygardagin 14. oktobur kl.12 giftast í Nairobi Pentecostal Church, Karen Assembly, Nairobi, Kenya, Kathryne Mayodi úr Nairobi og Ingi Kirke úr Kaldbak, bæði búsitandi í Keypmannahavn. Adressa: Dr.Bishop Earnest Mayodi, P.O.Box 21982, 00400, Tom Mboya, Nairobi, Kenya E.A.

Leygardagin 14. oktobur kl.16 giftast í Sands kirkju Beinta Fríðbjørg Simonsen og Erling Guðlaugur Arnarson ættaður av Akranesi. Veitslan verður í Virkinum kl. 19 fyri innbodnum.

Leygardagin 14. oktobur 2006 kl. 14.00 giftast í Betesda, Karin Maria Purkhús og Sjúrður Reginson Kunoy. Eftir vígsluna verður reseption í kjallaranum í Betesda til kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin. Døgurðin verður fyri innbodnum kl. 19.00 á Klaksvíkar Sjómansheimi.

Zarepta í Vatnsoyrum:

# Ein trúarspaki

**40 ár eru liðin síðani spakin varð settur í til byggingina av leguhúsinum Zarepta í Vatnsoyrum. 11. oktober vóru 70 ár síðan stigtakarin til Zarepta, Brynleif Hansen, varð føddur**

LEGUHÚS



*Brynleif Hansen, f. 11. oktober 1936, doyði í flogvanlukkuni í Mykinesi 26. september 1970, 33 ára gamal*

Fríggjadagin 6. oktober, vóru 40 ár liðin síðani spakin varð settur í til byggingina av Zarepta (gamla húsið) í Vatnsoyrum. Tað er ikki annað enn rætt at steðga á ein slíkan dag og gera eina lítla meting av týdninginum av hesum spakataki.

Tá fyrsti maðurin setti fótin á mánan, tók hann soleiðis til: "Eitt lítið fet fyri ein mann, men eitt stórt fet fyri mannættina." Soleiðis trúgvi eg, at vit við góðari grund eisini kunnu siga um hetta spakatakið norðast í Vatnsoyrum fyri 40 árum síðani: "Eitt lítið spakatak fyri ein mann, men eitt stórt spakatak fyri samkomulívið í Føroyum."

Hesin kann av sonnum kallast "ein trúarspaki," tí var tað ikki trúgv, sum stóð aftanfyri kvinnuna og mannin, sum fóru undir hetta stóra tak, so hevði hetta verkið aldri byrjað. Tað vóru ikki teir stóru pengarnir og heldur ikki almennar játtanir, sum góvu íblásturin til hetta verkið, men heldur var tað visjónin og kallið, og sum eisini hevur verið tann berandi grundin í øll hesi 40 árini, síðani fyrsti spakin varð settur í – og ynskjandi er, at tað eisini, tey næstu 40 árini, verður henda sama visjónin og kallið, sum verður drívkraftin aftanfyri arbeiði í Zarepta inntil Harrin kemur.

Tað er væl kent, tá Brynleif Hansen fór inn til Dánjal Nielsen (Dollan) á Vatnsoyrum at tosa við hann um at standa fyri byggingini. Tá segði Dánjal við Brynleif, at hann hevði lítið mót at fara undir eitt so stórt tiltak. Tá varð Brynleif eitt sindur firtin, og í tí hann fór um hurðina, so sigur hann við Dánjal: "So fari eg bara undir arbeiði sjálvur." Tá Brynleif var farin, sigur Dora, sum var kona Dánjal, við hann, "tá Brynleif hevur trúgv, so kanst tú eisini hava trúgv!"

Hesi orðini gjørdu, at Dánjal steðgaði á og hugsaði seg um, og úrslitið var, at hann tók eina heilaga avgerð inn fyri Harrans ásjón, og saman við Brynleifi og øðrum tók Dánjal hetta stóra arbeiði uppá seg at fara undir at byggja Zarepta, og tann 6.oktober í 1966 varð fyrsti spakin settur í, og síðani, í øll hesi fjøruti árini, hava menn og kvinnur, ung og eldri, allastaðni frá í landinum, ein óteljandi skari av arbeiðsfólki, arbeitt við spakum, skovlum, eyrhakkarum, gravmaskinum, hamarum, borimaskinum, kompressarum, blandimaskinum o.s.fr. og gjørt Zarepta til tað sum tað er í dag. Aftan fyri liggur eitt ókent tímatal og krónutal, men í Himli verður stór løn til øll tey, sum trúføst hava verið við í hesum arbeiði, bæði sædd og ósædd, bæði í lítlum sum í stórum.

Komandi summar eru 40 ár liðin síðani barnalegurnar byrjaðu í Zarepta.

Neyvan var tað av tilvild, at Brynleif Hansen valdi júst 6. oktober at vera dagin, tá spakin varð settur í, tí júst hesin dagurin var føðingardagurin hjá konu hansara, Elsu, og kanska var tað fyri at sýna henni eina tøkk fyri tann stuðul, hon hevði verið undir hansara lið og harvið ein stór orsøk til, at hann var komin har til, sum hann nú var komin, "tí undir liðini á einum virksomum manni, stendur ein virksom kona."

Til upplýsingar kann nevnast, at hevði Brynleif Hansen verið ímillum okkum í dag, so hevði hann kunna hildið sín 70 ára føðingardag mikudagin 11. oktober.

*"Tað største er ikki hvussu "langt" okkara lív er, men hvussu vit "liva" okkara lív."*

Sitat: Jim Elliot (trúboðari til Auca-indianarnar)

**pj**






*Fríggjadagin 6. oktober, vóru 40 ár liðin síðani spakin varð settur í til byggingina av Zarepta í Vatnsoyrum*

## 80 ára føðingardagur

Týsdagin 10. oktobur fylti Odd Nilssen í Vági 80 ár. Vælkomst verður leygardagin 14. oktobur kl. 19.00 í hølunum hjá Frelsunarherinum í Vági.